# Almanna- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 21.09.2023 |
| Mál nr.: | 23/18445 |
| Málsviðgjørt: | TVR/AJ |
| Ummælistíð: | 21.9./13.10.2023 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**heimild til at útvega uttanhýsis fígging til at byggja tjóðleikhús**

**§ 1.** Landsstýrisfólkinum verður heimilað at útvega uttanhýsis fígging til at byggja tjóðleikhús.
*Stk. 2.* Landskassin fíggjar í mesta lagi 200 mió. kr. av verkætlanini, undir hesum til fyrireiking og prosjektering.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2032.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Eitt nýtt tjóðleikhús verður bygt sum liður í at útvega føroyskari yrkisleik- og palllist tíðarhóskandi hølisumstøður á altjóða støði. Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2011 vórðu 5 mió. kr. játtaðar til at fyrireika og fara undir at byggja tjóðleikhús. Bygginevnd varð sett í september 2013 at fyrireika málið og varð liðug við uppskot til byggiskrá við árslok 2017, sum varð dagført í november 2018 og aftur í 2021 í sambandi við arkitektakappingina. Í 2020 varð avgerð tikin um at skriva út eina arkitektakapping um staðseting av tjóðleikhúsinum og eina arkitektakapping um bygningin. Hugskotskappingin um staðseting varð liðug á vári 2021, og varð Bursatangi mett at vera besta staðsetingin fyri Tjóðleikhúsið. Í 2022 vunnu MAP Arkitektar arkitektakappingina og eiga nú besta boðið upp á eitt nútímans leikhús, ið fer at hýsa palllist og øðrum kreativum tiltøkum. Húsið verður ein nýmótans mentanardepil og eitt vakstrarhús fyri ungar spírar, ið fer at menna og savna palllistina í landinum.

Á fíggjarlógini fyri 2023 vórðu 4 mió. kr. settar av til framhaldandi fyrireiking. Næsta stigið er at fáa semju við Tórshavnar kommunu um lendið og uttanumøkið. Tá ið heimild er fingin til vegar, verður farið undir at søkja uttanhýsis fíggingarkeldur um stuðul. Hareftir verður væntandi farið undir eitt skipanaruppskot og prosjektering. Eisini skal Tórshavnar kommuna broyta byggisamtyktina fyri økið. Eftir ætlan verða 7 mió. kr. settar av í 2024 og 10 mió. kr. í 2025. Landsverk metir við avísum fyritreytum, at samlaði kostnaðurin fer at vera um 600 mió. kr., og tá hevur man lagt upp fyri fleiri óvissum og prísvøkstri. Størsti parturin verður ikki goldin fyrr enn í 2026 og seinni, tá ið byggingin væntandi fer í gongd.

Til tess at halda áfram við hesi verkætlan er neyðugt, at landsstýrið kann fáa heimild at fara undir ítøkiliga at útvega uttanhýsis fígging til at byggja nýtt tjóðleikhús, soleiðis at landsstýrið eisini kann geva tilsøgn um landsins part av fíggingini, sum verður kravt av uttanhýsis fíggingarkeldum. Í arbeiðinum við at útvega fígging og at gera verklagslóg lidna verður neyðugt støðugt at eftirmeta og dagføra verkætlanina. Tí verður skotið upp, at heimildarlógin hevur gildi til 31. desember í 2032.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Eingin galdandi lóg er á økinum, og tískil er neyðugt við hesari lógini, so komast kann víðari í tilgongdini at fáa uttanhýsis fígging og at geva tilsøgn, sum kravt verður av fleiri uttanhýsis fíggingarkeldum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Samsvarandi stýrisskipanarlógini og játtanarskipanini verður her givin heimild til at útvega uttanhýsis fígging, og til at landið átekur sær at fíggja í mesta lagi 200 mió. kr. av samlaðu verkætlanini. Væntað verður, at størsti parturin av upphæddini ikki verður brúktur fyrr enn í 2026 og seinni, tá ið sjálv byggingin væntast at fara ígongd.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verður neyðug heimild fingin til vegar til tess at taka ímóti uttanhýsis fígging og at lata tilsøgn um landsins part av fíggingini, sum verður kravt av fleiri uttanhýsis fíggingarkeldum.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Hesi hava fingið uppskotið til ummælis:

Stjórnarráðini
Landsverk
Tórshavnar kommuna
Kommunufelagið
Tórshavnar havn
MAP Arkitektar
Tjóðpallur Føroya
Leiklistaráðið
Meginfelag áhugaleikara Føroya
Leikarafelag Føroya
Palllistafelag Føroya
Listafólkasamband Føroya

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Fíggjarligu avleiðingarnar fyri landið eru, at landið í mesta lagi fer at fíggja 200 mió. kr. til eina verkætlan, ið Landsverk við ávísum fyritreytum hevur mett at kosta á leið 600 mió. kr. Hetta merkir sostatt, at landið skal hava á leið 400 mió. kr. frá uttanhýsis fíggingarkeldum. Fram til 2026 standast flestu útreiðslurnar av fyrireikingum og prosjektering, og væntast kann tí, at størsti parturin av fíggingini av útreiðslunum fer at verða hildin í 2026 og árini fram til 2031. Eisini skal havast í huga, at Tjóðleikhúsið fer at krevja fígging frá landinum til økt leiklistavirksemi, rakstur og viðlíkahald.

Fyri Tórshavnar kommunu verða avleiddar útreiðslur av at skipa og menna økið kring leikhúsið, og annars í tann mun kommunan vil vera við til at stuðla verkætlanini.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Neyðugt verður at seta ein stýrisbólk at fylgja málinum og at taka avgerðir fyri byggiharra og bygginevnd - og møguliga eisini at ógilda avgerðir hjá byggiharra og bygginevnd. Stýrisbólkurin skal sambært Landsverki viðgera raðfesting av játtan, framdrátti, fíggjar- og tíðareftirliti, ráðgevara- og arbeiðstøkutrygging og viðurskifti av týðandi týdningi fyri verkætlanina.

Í stýrisbólkinum verða umboð fyri leiðsluna í Almanna- og mentamálaráðnum, Landsverk og Tjóðpall Føroya.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið fer sum frá líður at hava positivar avleiðingar fyri vinnuna vegna økt byggivirksemi.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Metast kann ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið annað enn, at bygt verður á einum havnaøki, har tað frammanundan er nógv virksemi.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Byggingin av tjóðleikhúsinum fer sum frá líður at hava ávirkan á høvuðsstaðin. Í byggitíðarskeiðinum kann væntast nakað av ampa fyri ferðslu og grannar í byggiøkinum. Lidni bygningurin og mentanarliga virksemið fara at hava jaliga ávirkan á høvuðsstaðin.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Verkætlanin fer at hava jaligar fylgjur fyri yrkisleik- og palllistina, sum fáa hóskandi høli og á sjónleikin og sjónleikarafelagsskapir sum heild í øllum landinum.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri nakran millumtjóðasáttmála.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi sáttmálar.

1) Evropeiska mannarættindasáttmálan, EMRS, "Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention". Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar við lóg tann 1. mai 2000.

2) Hoyvíkssáttmálan.

3) Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, ið áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009 við "Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap".

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið hevur ongar kendar markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til onnur, men heimilar landsstýrisfólkinum at útvega uttanhýsis fígging til at byggja tjóðleikhús.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Ja | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| avtalur og reglur | | | | | |
| Sosialar avleiðingar | [redacted] | | Nei | Nei | [redacted] |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Í § 1, stk. 1 verður ásett, at landsstýrisfólkið fær heimild til at útvega uttanhýsis fígging til at byggja tjóðleikhús. Talan kann vera um fígging frá ymsum fíggingarkeldum í Føroyum og uttanlands t.d. stuðul úr grunnum.

Í stk. 2 verður skotið upp, at landskassin fíggjar í mesta lagi 200 mió. kr. av verkætlanini. Sambært metingum frá Landsverki er samlaði kostnaðurin við ávísum fyritreytum mettur til á leið 600 mió. kr.

**Til § 2**
Lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. des. 2032, sum er eitt ár eftir, at verkætlanin væntast at vera liðug, soleiðis at tilsøgnin kann standa við eitt ár eftir, um eitthvørt óvæntað skuldi íkomið.

Almanna- og mentamálaráðið, dagfesting.

**Sirið Stenberg**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1:
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: